FJARHITAFELAGIÐ P/F

Umhvørvismálaráðið
Gongin 7
FO-100 Tórshavn

Tórshavn tann 31.01.2024

Hoyringssvar til uppskot til broytingar í elveitingarlógini – fjarhitavirksemi

Inngangur.

P/F Fjarhitafelagið fegnast um, at lóg um fjarhitavirksemi nú er sett á skrá, tí longu í 2016 sendi felagið eitt uppskot til táverandi Heilsu- og Innlendismálaráð um eina fjarhitalóg. Tað uppskotið varð gjørt eftir at felagið hevði haft samskifti og fund við "Dansk Fjernvarme" um hvussu fjarhitavirksemi var skipað og lógarregulera í Danmark.

Tað var í 1986, tá brennistøðin á Hjálla varð bygd, at kommunalpolitiski myndugleikin tók avgerð um at gagnnýta avlopsorkuna frá brennistøðini og verkinum á Sundi, og varð eitt fjarhitafelag sum lutafelag sett á stovn av SEV og Tórshavnar kommunu. Endamálið var eittans – at minka um oljunýtsluna í Føroyum til upphiting, og at felagið skuldi hvíla í sær sjálvum. Fíggingin til at leggja rørleiðingar í Hoyvíkshaganum kom úr Orkugrunninum, men tá kreppan kom í 1992, komu ognirnar á tvingsilssølu, og vóru tá keyptar av P/F Fjarhitafelagnum við somu eigarum, og sama endamálið sum fyri nú kollsiglda felagið. Síðani tá hava Tórshavnar Kommuna og SEV latið ókeypis avlopsorku til felagið, og hevur hetta gjørt tað møguligt at útbygt fjarhitanetið, so tað røkkur frá Sundsverkinum, umvegis Sandvíkarhjálla og út á Klingurstjørn á Argjum, og hevur felagið nú 1840 brúkarar, ið svarar til eina minni oljunýtslu í Føroyum uppá 5000 tons. Felagið hevur eisini avtalu við biogasverkið Førka um keyp av orku frá teimum táið, neyðugt er við ískoytisorku, um Brennistøðin og Sundsverkið ikki kunnu nøkta orkutørvin.

Felagið hevur ætlanir um at røkka longur út til brúkararnar, og hevur ætlanir um útbyggingar, so gjørligt verður at framleiða heitt vatn burtur úr vindorku til m.a. at goyma til tá eingin vindur er.

Um uppskotið.

Vit hava merkt okkum at fleiri viðurskiftir, sum eisini vóru í okkara uppskotið frá 2016, eru tikin við í hesum uppskotinum, m.a. at loyvi við kærurætti krevst til fjarhitavirksemi, sum ger at rættartrygdin hjá okkum og kundum okkara verður vard. Eisini hava vit merkt okkum, at heimild verður til at ognartaka lendi, um tað gerst neyðugt fyri at føra leiðingar fram.

Viðv. § 15 a.

Í stk. 4 er talan um at áseta hvussu stórur partur av fjarhitaveitingini í minsta lagi skal koma sum avlopshiti frá virkjum og varandi orkukeldum. Fjarhitaveitarin hevur eina veitingarskyldu, so fremst má raðfestast í rakstrinum, at kundarnir fáa nøktandi fjarhitaveiting. Hvørt man í hesi áseting meinar við mátt ella orkunøgd er týðandi, veitingin skal kunna tola óhapp og aðrar rakstraravbjóðingar.

Viðv. § 15 c.

Stk. 1 burdi eisini innihildið ásetingar um back-up vísandi til veitingartrygdina mótvegis kundum.

Viðv. § 15 b.

Her eru í nr 3) krøv um upplýsingar sum skulu útvegast, men hildið verður, at hesar treytir eru alt ov yvirskipaðar, og tí tilvildarligar. Eitt nú er eingin nágreining um hvat ein "virkis- og samfelagsbúskaparlig greining og meting" er, og hvat greiningin og metingin byggir á. Man kann tí óttast fyri, at greiningin og metingin verður arbitrer og tilvildarlig alt eftir hvat embætisfólk viðgerð eina ætlan. Hetta ber ikki til í einum framkomnum rættarsamfelag. Sama er galdandi fyri nr. 5), hvussu fyrimunir og vansar verða mettir, og út frá hvørjum kriterium, har einki er upplýst um hesi viðurskiftir,

Her má ein betri og nágreinað áseting koma, sum ikki letur ivaspurningar hanga í luftini.

Í nr 6) verður spurningur um íbindingarskyldu nevndur, og í viðmerkingunum nevnt at henda ásetingin skal síggjast aftur í prísásetingini, og um brúkarin verður bundin av einari fjarhitaskipan, uttan møguleika til sjálvur at velja aðra orkuskipan, sum møguliga er bíligari og meira umhvørvisliga burðardygg.

Her eigur spurnartekin at verða sett til viðmerkingina, um tað gagnliga í eini heildarskipan í mun til eitt "pop up" tilboð frá einum veitara til ein ávísan brúkara. Tað ber ikki til at leggja fjarhitaleiðingar við livitíð uppá 40-60 ár undir sovornum treytum. Fær ein borgari eitt tilboð uppá eina hitapumpu, so eigur sum minstamark alt at verða "benchmarka", bæði livitíð, dálking, burturbeining o. s. fr..

Tað tykist eisini at mangla ásetingar og krøv til aðrar hitaskipanir, eitt nú hitapumpur. Tað stendur hvørjum persóni frítt fyri at innflyta og selja t.d. hitapumpur, uttan at nøkur krøv eru í hesum sambandi, herundir um plasering, um viðlíkahald, ella um burturbeining, og tykist ikki sum at hesir spurningar eru viðgjørdir yvirhøvur.

Í okkara uppskoti frá 2016, varð ásetingin um at kommunur kundu áleggja verandi og komandi útstykkingum fjarhita, og yvir eitt tíðarskeið áleggja borgarum at binda í eina verandi fjarhitaskipan, alt fyri at minka um oljunýtsluna, og tykist hesin møguleikin ikki at vera partur av hesi ætlanini.

Samanumtikið halda vit ikki at uppskotið er nóg væl gjøgnumarbeitt og alt ov yvirskipað. Eisini halda vit, at tað er undrunarvert, at vit sum fjarhitaframleiðarar í skjótt 40 ár, bert eru bodnir til ein stuttan kunnandi fund um málið, tá vit meta at sita inni við hállari vitan um slíkt virksemi, eins og vit hava gott samband við javnlík feløg í Danmark, har fjarhitanetið er sera nógv útbygt. Okkara meting er eisini at fjarhitaskipan er nógv tann mest burðardygga og grøna skipanin, sum kann fáast.

Vinarliga

Fjarhitafelagið P/F

Hans Chr. Dam